LM-114/2020

Kommunufelagið

17. februar 2021

Okkara j. nr.

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um KT- heildarætlan fyri undirvísingarverkið

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til omanfyri nevnda uppskot.

Uppskotið er viðgjørt á fundi í stýrinum fyri Kommunufelagið d.d.

Lógaruppskotið ber heiti "Uppskot til løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið", umframt at § 1, stk. 1 eisini brúkar heitið "KT-heildarætlanina...". Í § 1, stk. 2. verður sagt at útreiðslurnar til at fremja KT-heildarætlanina kunnu í mesta lagi verða 40 mió. kr.

Her tykist vera ógreiða, tí at heildarætlanin fevnir um tveir høvuðstættir t.e. ein KT-kervispartur, nevndur Skúlanet, ið fevnir um KT-netverk/ -trygd, KT-tól og ávísar KT-skipanir, umframt trygdarviðurskifti, meðan hin parturin snýr seg um eina felags lestrarfyrisitingarliga KT- skipan, ið er ein serstøk samansett heildarskipan ella fakskipan, ið er serliga snikkað til undirvísingarverkið sum heild. Sum tað framgongur av fylgiskjalinum, so er tað tann seinna skipanin, ið verður mett at kosta 40 mio.kr., meðan netverksparturin ikki er fevndur av tí. Kommunufelagið er partur av arbeiðsbólki hjá UMMR, ið viðgerð júst hvussu tann parturin skal skipast og har tað verður gjørt við at hava 2 stig av limaskapi. Tann parturin er í høvuðsheitum fevndur av rakstrarábyrgdini hjá kommununum fyri fólkaskúlan (fólkaskúlalógini § 47, stk 4).

Kommunufelagið hevur ikki viðgjørt spurningin um kostnað fyri LFS-skipanina, men metir sum heild, at slíkar tilgongdir eru sera krevjandi og skal nógv til fyri at koma á mál við slíkari framsóknari skipan.

Eisini skal nevnast, at Kommunufelagið og UMMR í fjør gjørdu eina standardavtalu, sum er ein heildaravtalu um veitingar frá Námi, ið bæði fevnir um undirvísingartilfar og skipanir, ið koma at vera partur av eini komandi LFS-skipan.

Kommunufelagið mælir til at lógaruppskotið verður broytt soleiðis at tað snýr seg um LFS-skipanina burturav. Rakstrarviðurskifti fólkaskúlans eiga at vera skipaði í fólkaskúlalógini og skal Kommunufelagið vísa á, at felagið í 2019 lat hoyringarsvar viðvíkjandi tillagingum í fólkaskúlalógini, herundir tillagingum viðvíkjandi rakstrarviðurskiftum í mun til kommunurnar sum staðbundin skúlamyndugleiki.

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Kommunufelagið

Tað vísir seg framvegis at vera tørvur á teimum tillagingum, sum nevndar eru í hoyringarskrivinum frá januar 2019 og hesin tørvurin gerst alt meira sjónligur tá tosað verður um KT í fólkaskúlum og ikki minst í mun til nýggju dátuverndarkrøvini.

Til seinast loyvir Kommunufelagið sær at viðmerkja, at henda KT-verkætlanin, ið er kostnaðarmikil og sum lutfalsliga sæð tekur stóran part av landsfíggingini til íløgur í undirvísingarkrevinum, má ikki nerva raðfestingina av framhaldandi menning av undirvísingartilfari til fólkaskúlarnar.

Vegna Kommunufelagið

Heðin Mortensen, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo